Ruth Vang
Bjarni Kárason Petersen
løgtingsmenn

Løgtingið

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur
(Rætturin til fyribils uppihaldsveiting í sambandi við vantandi barnaansing er óheftur av ogn hjá viðkomandi ella hjúnafelaga)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 12. desember 2020, § 11 í løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021 og løgtingslóg nr. 71 frá 5. mai 2022 verður í § 20 aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett: "Stk. 3. Ásetingarnar í stk. 1 og 2 eru ikki galdandi, tá talan er um fyribils uppihaldsveiting vegna vantandi barnaansing."
Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 4-6.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Almennar viðmerkingar
Fyribils uppihaldsveitingin vegna vantandi barnaansing er ein veiting, tú fært, tá kommunan ikki fær veitt tær barnaansing, sum tú annars hevur rætt til. Uppskotsstillararnir meta tað vera sera óheppið, at barnafamiljur, sum hava savnað sær pening meiri enn kr. 30.000 missa rættin til hesa veiting. Tað er sera vanligt og samtíðis sera skilagott, at ungar familjur savna sær pening til egnan bústað. Við hesum uppskoti verður sæð burtur frá ogn yvir kr. 30.000 fyri tey, sum fáa fyribils uppihaldsveiting vegna vantandi barnaansing.

Galdandi skipan
Um tú ikki fær ansingarpláss á dagstovni ella í dagrøkt, og tí ikki sleppur til arbeiðis, hevur tú møguleika fyri at søkja um fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Tað er ein treyt fyri at fáa veitingina, at barnið er skrivað upp til dagstovnapláss og kommunan skal hvønn mánað vátta, at pláss er ikki tøkt til barnið. Haraftrat eru vanligu treytirnar galdandi fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting; at tú ikki hevur inntøku av týdningi, at tú ikki hevur ogn yvir kr. 30.000, at tú er búsitandi og uppiheldur tær í Føroyum og at tú ert eldri enn 18 ár. Um tú er yngri enn 18 ár, so kanst tú fáa fyribils uppihaldsveiting, um tú ert við barn, ert foreldur at barni ella ert í hjúnalagi. Hevur tú aðra inntøku sama tíðarskeið, tú fært uppihaldsveiting, verður inntøkan mótroknað í veitingini.

Ert tú einsamallur við uppihaldsskyldu fært tú 90% av hægstu uppihaldsveiting og ert tú sambúgvandi fært tú 70%. Í 2022 eru hesar upphæddir ávikavist kr. 17.038,80 og kr. 13.252,40.

Veitingin verður í fyrsta umfari rindað av Almannaverkinum, men avvarðandi kommuna endurrindar Almannaverkinum upphæddina. Tað eru sostatt kommunurnar burturav, sum hava útreiðslurnar av júst hesi skipanini. Havast skal í huga, at so leingi barnið ikki er á dagstovni, hevur kommunan ikki útreiðslur til vøggustovu fyri júst hetta barnið. Sum dømi kann nevnast, at eitt vøggustovupláss í størstu kommunu í landinum, Tórshavnar kommunu, kostar kr. 9.122 um mánaðin, og kr. 12.496, um barnið hevur fríplás ella fær systkinafrádrátt. Væntast kann, at tað, at uppihaldsveitingin kostar kommununum meiri enn dagstovnaplássið, fer at skunda undir, at kommunan fær til vegar dagstovnapláss svarandi til tørvin.

Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er, at treytin um at tú ikki skalt hava ogn yvir kr. 30.000 fyri at fáa fyribils uppihaldsveiting skal strikast, tá orsøkin til at tú fært veitingina er vantandi barnaansing.
Tað er sera vanligt, at júst tey árini tú fært børn, savnar tú pening við tí fyri eyga at fáa føtur undir egið borð. Tí er tað sera óheppið, at ein møgulig uppsparing til bústað skal forða fyri, at ein barnafamilja, sum ikki fær barnaansing, fær eina fyribils uppihaldsveiting, sum hon annars hevur rætt til.
Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar, men mælt verður til, at t.d. Kommunufelagið og Almannaverkið verða hoyrd undir tingviðgerðini.

Avleiðingarnar av uppskotinum
Uppskotið fær ikki fíggjarligar avleiðingar fyri landskassan, men fær fíggjarligar avleiðingar fyri tær kommunur, sum ikki kunnu bjóða barnafamiljum barnaansing. Mett leysliga kostar uppihaldsveitingin kommununum nakrar túsund krónur meiri sammett við útreiðslurnar av einum vøggustovuplássi, sum skipanin er nú. Tað er torført at meta um, hvussu stórar meirútreiðslurnar vera við broytingini, tí vit vita ikki, hvussu nógv halda seg frá at søkja um veiting, tí tey frammanundan vita, at tey ikki liva upp til verandi treytir.

Tað er serliga í Tórshavnar kommunu, at tað eru lutfalsliga nógv børn, sum ikki sleppa á stovn vegna vantandi pláss. Í flestøllum øðrum kommunum í landinum er støðan tann, at lítil og ongin bíðitíð er eftir dagstovnaplássi og ofta er bíðitíð bara fáu mánaðirnar undan summarfrítíðini, áðrenn eldru børnini fara úr dagstovni í skúla.

Serligar viðmerkingar

Til § 1
Sambært ásetingini verður sæð burtur frá ogn hjá viðkomandi persóni ella hjúnafelaga, sum kann nýtast til uppihald, tá talan er um møguleikan at fáa fyribils uppihaldsveiting sambært § 11, stk. 1 í lógini vegna vantandi barnaansing.

Til § 2
Gildiskoma.

Á Løgtingi, 30. september 2022

Ruth Vang Bjarni Kárason Petersen